# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hví ikki nøgdsemiskanning?

Hvønn arbeiðir tað almenna fyri? Tað almenna arbeiðir fyri borgaran. Tað tykjast tinglimir hava gloymt.

Sjálvstýrisflokkurin legði herfyri eitt skilagott uppskot fram um at gera eina nøgdsemiskanning av tí almenna. Ein og hvør tænastuveitari – eisini tað almenna – eigur at vera vigaður viðhvørt av teimum, ið tey eiga at tæna.

Hetta er ein sjálvfylgja, og serliga er hetta neyðugt hjá okkum, har tað almenna er vaksið við hundraðtals fólkum seinnu árini.

Tað er lítið at ivast í, at tey allarflestu, ið arbeiða innan tað almenna eru pliktuppfyllandi og gera sítt arbeiði eftir besta førimuni innan tær skipanir og teir karmar, sum nú einaferð eru givinir. Men hvør sigur, at karmarnir eru rættir? Hvør sigur, at skipaninar innan tað almenna virka nóg væl?

Okkara miðfyrisiting virkar ikki nóg væl í summum førum. Hon tykist fyrst og fremst at raðfesta, at tiknar avgerðir skulu verjast, ístaðin fyri at hyggja at, hvat er rangt og rætt, og hvat tænir borgaranum best.

Tað kundi verið sera áhugavert at fingið eina nøgdsemiskanning av eitt nú miðfyrisitingini. Hví vilja politikarar ikki vita, hvat viðskiftafólkini hjá miðfyrisitingini halda? Eingin sigur, at afturmeldingarnar fara at vera meiri negativar enn positivar.

Tað nyttar einki at seta tingini svart/hvítt upp og gerast firtin, um onkur politikari setur spurnartekin við tann almenna sektorin í dag.

Í einari stórari skipan, so vil tað altíð vera okkurt, sum riggar væl, meðan tað vil vera annað, sum riggar minni væl. At avnokta hetta, er at nokta at síggja veruleikan, sum hann er.

At spyrja miðfyrisitingina og almennar stovnar, hvat hesi halda um seg sjálvan, gevur eina rættiliga forútsigiliga niðurstøðu. Tí mugu vit skjótast gjørligt fáa eina nøgdsemiskanning av tí almenna, so at vanligi skattgjaldarin kann siga sína meining.

Ein nøgdsemiskanning er eisini ein kærkomin møguleiki at geva almennum stovnum og starvsfólkum eitt herðaklapp. Tað er eingin ivi um, at nógv rós vil koma frá borgaranum. Tað eru nógvir stovnar, sum klára seg ótrúliga væl, tá man hugsar um, hvussu lítið hesir hava at arbeiða við. Um so er, at nakað er galið, so vil tað í flestu førum verða skeivir karmar og skeivar skipanir, sum eru orsøkin. Tað er ábyrgdin hjá politikarnum og ikki hjá starvsfólkunum.

Tí má niðurstøðan verða, at tá allir tinglimir uttan tríggir ikki vilja samtykkja eina nøgdsemiskanning av tí almenna í Føroyum, so verja tinglimirnir bara seg sjálvar og ikki almenn starvsfólk.

**Sosialurin**

# Dagsins politikkur í søguligum ljósi

**HELGI ABRAHAMSEN**
løgtingsmaður



Seinasta hósdag viðgjørdi løgtingið eitt uppskot frá Sjálvstýrisflokkinum um at minka heildarveitingina burtur í einki eftir eini fastari skipan.

Sum vit so mangan fyrr hava sæð, so fylgdu aftur hesaferð nakrar útvaldar talvur og grafar við uppskotinum, sum skuldu vísa, at heildarveitingin hevur lítið og einki at týða fyri føroyska búskapin. Upplýst varð millum annað, hvussu nógv prosent hon er av bruttotjóðarúrtøkuni, og hvussu stórur partur hon er av samlaðu inntøkum landskassans.

Men hví brúka júst hesi tølini? Hví ikki heldur rokna út, hvussu stóran týdning heildarveitingin hevur fyri samlaða úrslitið á botnlinjuni hjá landskassanum?

**Talandi tøl**

Rætt er tað, at heildarveitingin síðani 2001 er minkað við 36 prosentum, men í sama tíðarskeiði er avlopið hjá landskassanum minkað við ikki minni enn 172 prosentum.

Í 2001 var heildarveitingin 298 mió. krónur størri enn avlopið, men nú er avlopið vent til 500 mió. krónur í halli, meðan heildarveitingin framvegis heldur sær uppi á góðum 600 mió. krónum. Sostatt er heildarveitingin nú umleið 1.100 mió. krónur omanfyri "avlopið".

Tað sum eftir er av heildarveitingini er ein líka stór upphædd, sum tað kostar at bora ein Sandoyartunnil um árið!

**Søguliga gongdin**

Mangt er broytt, síðani hin minniliga 17. mars 2000, tá fullveldislandsstýrið var til fyrstu samráðingarnar í Keypmannahavn, um at skipa Føroyar sum fullveldi.

Longu á fyrsta samráðingarfundinum legði landsstýrið upp til, at vit skuldu hava 15 ára búskaparliga skiftistíð. Eitt innviklað roknistykki varð sett upp sum segði, at Føroyar skuldu hava eina árliga veiting úr ríkiskassanum á 650 mió. krónur, líka til føroyska bruttotjóðarúrtøkan var vaksin til eina so stóra upphædd, at tær 650 milliónirnar svaraðu til 3 % av bruttotjóðarúrtøkuni. Frá tí degi skuldi heildarveitingin minkast burtur eftir trimum árum.

Um vit dividera 650 mió. við 3 og falda við 100, so síggja vit, at 650 mió. eru 3 % av 21,7 milliardum. Tað vil siga, at 3 ár aftaná at samlaði føroyski búskapurin var komin uppá 21,7 mia., skuldi heildarveitingin burtur. Til ta tíð, skuldi hon vera 650 mió. krónur um árið.

Danska fíggjarmálaráðið roknaði seg fram til, at um vit fylgdu hesum leistinum, so fór skiftistíðin at vara millum 50 og 80 ár.

Nú eru vit komin út í níggjunda árið síðani 2000, og enn er bruttotjóðarúrtøkan bara komin uppá einar 12 milliardir, so um vit skulu fylgja sáttmálauppskotinum hjá fullveldislandsstýrinum, so verður tað ein løta (helst rættiliga nógv ár), til vit koma uppá hasar 21,7 milliardirnar.

**Seldu oljuna áðrenn hon var funnin**

Vit skulu sjálvandi ikki síggja burtur frá, at fullveldissamráðingarnar byrjaðu um somu tíð, sum fyrireikingar vórðu gjørdar til fyrstu royndarborðingarnar eftir olju á Føroyska landgrunninum, so helst hava oljudreymarnir givið stórar vónir um ein eksploderandi búskaparvøkstur.

Á næsta samráðingarfundinum hálaði fullveldislandsstýrið henda stóra trumfin upp úr ermuni. Ein roynd varð tá gjørd at viga møguligar føroyskar oljuinntøkur upp ímóti heildarveitingini. Ein roynd var eisini gjørd at fáa sett nýggja ríkissáttmálan stigvíst í gildi soleiðis, at Føroyar kundu verða hangandi í ríkinum í 15 ár, og sostatt varðveita rættin til blokkstuðul í eina tíð. Afturat hesum segði landsstýrið seg eisini hava ein triðja møguleika kláran, nevniliga eitt uppskot um at øll uttanlandaskuldin í ríkinum skuldi verða løgd saman og síðani verða býtt millum partarnar eftir fólkatali. Harvið høvdu Føroyar verið so at siga skuldarfríðar, meðan danskir skattgjaldarar høvdu hingið upp á rokningina. Einaferð var talan eisini um at fáa eitt triðja land (Ísland) at vera semingsstovnur. Tann nú so víðagitni David Oddson skuldi vera semingsmaður, men treytirnar frá donsku stjórnini vóru greiðar: Føroyar fingu fullveldi, um Føroya fólk ynskti tað, men so merkti tað eisini, at føroyingar mistu danska ríkisborgararættin, og búskaparliga skiftistíðin bleiv trý til fýra ár.

**Fyrst olju síðani fólkaatkvøðu**

Tá talan var um at hava fólkaatkvøðu í mai 2001, mælti Helena Dam á Neystabø til at bíða til 14. september, tí tá vistu vit, um vit høvdu funnið olju. Hon hevði helst ikki hugsað tann tankan, at vit kanska ikki funnu nakra olju.

Og so var tað fólkatingsvaldagin í 2001. Tá hevði Høgni Hoydal funnið olju. Í lýsing í bløðunum boðaði hann frá hesum, og at tað nú bara var ein spurningur um, hvør átti oljuna.

**Lekur ímillum teori og praksis**

Sigast má, at teoriirnar hava verið nógvar og fagrar, tá talan hevur verið um at lække heildarveitingina, men í praksis hevur veruleikin verið ein annar.

Neyð lærir nakna kvinnu at spinna, verður sagt. Vit hava lækkað heildarveitingina og kanska er onkur blivin meira nakin, men framvegis verður ikki meira spunnið enn tað sama.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn standa undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.